# Lastbilur lak olju

## Ein lastbilafyritøka kann vænta sær rokning fyri at ein bilur teirra í morgun lak olju á vegnum frá Sandvíkahjalla og víðari niðan í Hoyvík

Randi Jacobsen

Klokkan 8.45 í morgun fleyt olja á vegnum heilt frá Skarðshjalla, eftir landsvergnum, Vegnum Langa og niðan móti Karla Magnusarbreyt.

So mikið av olju var á vegnum, at bilarnir gliðu.

Boðini vórðu send til sløkkiliðið í Havn og til Landsverk, sum fóru at reinsa vegin.

Politiið fann skjótt fram til lastbilin, sum hevði likið oljuna. Hann hevði verið á Hjalla eftir gróti og koyrt tað til eitt byggipláss í Hoyvíkshaganum.

Sambært politinum kann lastbilaførarin vænta at verða skuldsettur fyri dólkingina, og eigarin fær rokningina fyri uppruddingina.

# Píkadekk minka um deyðsvanlukkur

Píkadekk kunnu minka um deyðsvanlukkur í hálku við heili 42 prosentum. Tað vísur ein nýggj kanning, sum júst er kunngjørd í Svøríki.

Svenska Trafikverket og Vectura í Svøríki hava staðið fyri kanningini, har kannað var, hvør munurin er millum vanlig vetrardekk og píkadekk í sambandi við deyðsvanlukkur í hálku.

Kanningin staðfestir, at fyri teir bilar, sum ikki hava ESP anti-spinn skipanina, er stórur munur á, um fólk brúka píkadekk ella vetrardekk.

Tá ið talan er um bilar við ESP skipanini – og tað eru flestu nýggjari bilar – hevur tað minni týdning, um bilar brúka píkadekk ella vetrardekk.

Landsverk sigur, at tað týdningarmesta er hóast alt, at fólk skifta frá summardekkum til vetrardekk í hálktíðini



*Tingfólk fáa fleiri ferðir so nógvan koyristuðul sum aðrir løntakarar, og tá skal leggjast aftrat, at tingfólk fáa fyri 100 dagar, og onnur fyri 220 dagar*

# Løgtingsfólk varðveita koyristuðulin

## Koyristuðulin til fólk, sum hava minni enn 50 km til arbeiðis, fellur burtur, men koyristuðulin til løgtingsfólk verður ikki rørdur

Randi Jacobsen

Koyristuðulin til fólk, sum hava langan veg til arbeiðis, verður nú minkaður við tveimum milliónum krónum.

Tað verður gjørt upp á tann mátan, at tey, sum hava minni enn 50 km til arbeiðis aftur og fram, fara hereftir ongan stuðul longur at fáa, og stuðul verður latin í mesta lagi í 220 dagar.

Hetta merkir, at heilt nógv fólk fara at missa ferðastuðulin.

Men samstundis verður ikki rørt við ferðastuðulin, sum løgtingsfólk fáa, sjálvt um tey frammanundan fáa væl meira enn onnur í stuðuli. Hesin stuðul er ásettur við lóg.

Tey fáa flutningskostnaðin endurgoldnan við at ferðast við egnum bili við Strandferðsluni 100 ferðir um árið, og tey fáa koyripening millum Heimstað og Tórshavnar 100 ferðir um árið.

Tingfólk, sum búgva í Havn, í Hoyvík, á Argjum og á Hvítanesi fáa tó ongan stuðul.

Tað eydnaðist í dag hvørki at fáa viðmerking frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum ella løgmanni. Formaðurin í fíggjarnevndini hevði ikki hug at gera nakra viðmerking.

Sum skilst er ikki semja í samgonguni um hetta uppskot, ið ikki hevur verið til hoyringar.

John Johannesen, formaður í tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum er als ikki nøgdur við, at skarvast skal av ferðastuðlinum hjá vanligum arbeiðsfólki og ikki hjá tingfólkum. Hann heldur tað ikki líkjast nøkrum, at tingfólk fáa fleiri ferðir so nógv í ferðastuðli sum onnur fyri at koyra sama tein til arbeiðis.

### Munur á fólki

– Summi tosa um at lækka tinglønina hjá tingfólkum. Lønin er einki at tosa um. Heldur eigur at verða hugt eftir stóru viðbótunum, sum summi tingfólk fáa, sigur John Johannesen.

Ein sammeting av, hvussu nógv ein vanligur løntakari og ein tingmaður búsitandi í eitt nú Klaksvík vísir, at løntakarin fær 15.603 krónurum árið fyri at ferðast millum Klaksvík og Tórshavn. Tingfólkið fær 83.120 krónur.

Ein løntakari í Sandoynni við arbeiði í Havn, fær 4.704 krónur í ferðastuðuli. Tingfólkið fær 37.320 krónur.

Ein vágbingur, sum arbeiðir í Havn, fær 11.193 krónur um árið. Tingfólkið við bústaði í Vági fær 61.280 krónur.

# Línubátur fekk trol um skrúvuna

## Jákup B misti eitt samdøgur, tí hann fekk trol um skrúva og noyddist inn at faá tað av

Randi Jacobsen

Sunnukvøldið kom Tjaldorið inn á Vestmanna við línubátinum Jákupi B úr Klaksvík.

Jákup B royndi í ein útnyrðing úr Mykinesi, tá ið hann fekk trol um skrúvuna.

Grímur Lassen, reiðari sigur, at Jákup B noyddist at bíða fleiri tímar eftir Tjaldrinum, og tað tók sína tíð at sigla inn á Vestmanna.

Fyri at froskmenninir kundu fara niður, var neyðugt at fara inn.

Tað tók ikki langa tíð at fáa trolið av, men óhappið gjørdi, at teir mistu eitt samdøgur.

Teir høvdu nakað av línu standandi og settu í nátt.na fyri uppruddingina.



*Tjaldrið sleipaði Jákup B inn*

*Mynd: Álvur Haraldsen*